## 91 milliónir í ársløn

Tað eru ikki smápengar, sum eru upp á spæl, nú heimsins dýrasti fótbóltshandil er um at verða gjørdur. Umframt tær 690 milliónirnar, sum Real Madrid skal rinda Manchester United fyri at keypa Cristiano Ronaldo, skal spælarin eisini hava nakað í løn. Sambært ensku miðlunum fær Ronaldo ein lønarvøkstur upp á 100%, nú hann skiftir felag. Hetta gevur eina ársløn upp á 91 milliónir krónur – ella við øðrum orðum 250.000 krónur um dagin.



## Calderon keypti Ronaldo

Nú fyrrverandi forsetin í Real Madrid, Ramon Calderon, sigur nú, at tað er honum at takka, at Cristiano Ronaldo kemur til felagið. – Í fjør segði Manchester United, at tað var ov tíðliga at gjøgnumføra handilin, so vit samdust um, at hetta skuldi henda í summar ístaðin. Ronaldo hevur jú fleiri ferðir sagt, at hann ynskti at spæla fyri Real Madrid, og avtalan, sum vit gjørdu í fjør, var fín fyri allar partar, sigur Calderon við SkySports.



*Skulu meistararnir spæla við um meistaraheitið, er treytaleysa kravið ein sigur, tá HB vitjar við Margáir sunnudagin*
*savnsmynd*

# Sannleikans tími hjá meistarunum

**Skal HB ikki stinga fullkomuliga av frá EB/Streymi, eru trý stig treytaleyst krav hjá heimaliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við góðum triðingi farnum av kappingarárinum, er oddurin av Vodafone-deildini veruliga við at taka skap.

Og heldur óvæntað er hetta eitt skap, har meistararnir úr EB/Streymi ikki reiðuliga eru partur av myndini.

EB/Streymur er í løtuni sjey stig aftan fyri oddaliðið úr HB, og tað er ein munur, sum er í meira lagi av tí, sum fólkið kring samansetta liðið vil góðtaka.

Tí er eingin sum helst ivi um, at tað er sigurin, sum farið verður eftir, tá HB kemur á vitjan við Margáir sunnudagin.

Hinvegin hevur HB eisini sítt at spæla fyri. Veruleikin er nevnliga, at fær HB einki burtur úr dystinum, so kann støðan sunnukvøldið vera tann, at trý lið eru jøvn á oddasessinum.

Bæði NSÍ og Víkingur eru nevnliga greiðir favorittar í sínum dystum. Tey bæði liðini spæla á heimavølli móti liðunum, sum eru undir niðurflytingarstrikuni, og eftir hesum fortreytunum er ilt at síggja, at tað er hetta umfarið at KÍ og 07 Vestur skulu gera tann heilt stóra vørrin.

### Botnbrak í Gundadali

Spenningurin er eisini stórur í Gundadali, har B36 tekur ímóti ÍF.

Tá B36 í næsta umfari vitjaði í Fuglafirði, vann ártalsfelagið ein hampuliga óvæntaðan sigur, sum avgjørt hevði sína ávirkan á laku byrjanina, sum ÍF fekk upp á árið.

Tí naggatódnini eru fuglfirðingarnir enn ikki komnir burturúr, og nú ræður um at fáa sigrar á borðið, soleiðis at hóttanin frá niðurflytingarstrikuni kann beinast burtur.

Og júst hetta er eisini setningurin hjá B36, har tey næstan hava gloymt, hvussu tað er at vinna dystir. Í øllum førum hava spælarar sum Johan Ellingsgaard, Jóan Pauli Jakobsen og Róaldur Jacobsen havt tað munandi betur, nú teir í Vodafone-steðginum hava vunnið bæði landsdyst móti Russlandi og steypakapping móti EB/Streymi.

Seinasti dysturin er á Argjum, har AB hevur havt sterkan skansa í ár. Toftamenn eru hinvegin als ikki sørir, og megna teir enn eina ferð at taka trý stig við sær av vøllinum, fer tað av álvara at líkjast einum heilt áhugaverdum fótbóltssummari á Svangaskarði.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 13.06 | 19.00 | Føroyar-Italia |

**Kvinnuflogbóltur**

| | | |
|---|---|---|
| 13.06 | 15.00 | Føroyar-Danmark |
| 14.06 | 14.15 | Føroyar-Danmark |

**Vodafone-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 13.06 | AB-B68 | Ransin N. Djurhuus |
| 13.06 | Víkingur-KÍ | Lars Muller |
| 14.06 | NSÍ-07 Vestur | Gerg N. Rasmussen |
| 14.06 | EB/S-HB | Dagfinn Olsen |
| 14.06 | B36-ÍF | Petur Reinert |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 13.06 | B71-Víkingur | Rúni Gaardbo |
| 13.06 | Skála-VB/S | Birgir Sondum |
| 13.06 | TB-FC Hoyvík | Bárður Mortensen |
| 13.06 | NSÍ-B68 | Dagfinn Olsen |
| 13.06 | B36-ÍF | Petur Reinert |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 14.06 | ÍF-Víkingur | Eugen Voda |
| 14.06 | KÍ-EB/S | Kári J. á Høvdanum |
| 14.06 | TB-B71 | Niels Petersen |
| 14.06 | Undri-B36 | Bent T. Linklett |
| 14.06 | 07 Vestur-AB | Pætu Albinus |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 14.06 | KÍ-Skála | Elsa Andreasen |
| 14.06 | AB-B68/NSÍ | Jóhan P. Mikkelsen |
| 14.06 | EB/S-Víkingur | Verner Hentze |

## vodafone deildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 10 | 7 | - | 2 | - | 1 | 26 | 14 | 12 | 23 |
| 2 Víkingur | 10 | 6 | - | 2 | - | 2 | 22 | 14 | 8 | 20 |
| 3 NSÍ | 10 | 6 | - | 2 | - | 2 | 21 | 14 | 7 | 20 |
| 4 EB/S | 10 | 4 | - | 4 | - | 2 | 18 | 12 | 6 | 16 |
| 5 B68 | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 18 | 18 | 0 | 15 |
| 6 AB | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 12 | 13 | -1 | 14 |
| 7 B36 | 10 | 3 | - | 2 | - | 5 | 14 | 20 | -6 | 11 |
| 8 ÍF | 10 | 2 | - | 2 | - | 6 | 11 | 18 | -7 | 8 |
| 9 07 Vestur | 10 | 1 | - | 3 | - | 6 | 19 | 29 | -10 | 6 |
| 10 KÍ | 10 | 0 | - | 4 | - | 6 | 7 | 16 | -9 | 4 |

**Formbarometrið**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 19 | 10 | 9 | 14 |
| 2 Víkingur | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 11 | 8 | 3 | 13 |
| 3 B68 | 6 | 3 | - | 3 | - | 0 | 14 | 9 | 5 | 12 |
| 4 EB/S | 6 | 2 | - | 4 | - | 0 | 10 | 6 | 4 | 10 |
| 5 NSÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 8 | 2 | 10 |
| 6 AB | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 7 | 9 | -2 | 8 |
| 7 ÍF | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 7 | 10 | -3 | 5 |
| 8 07 Vestur | 6 | 0 | - | 3 | - | 3 | 11 | 15 | -4 | 3 |
| 9 B36 | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 6 | 13 | -7 | 2 |
| 10 KÍ | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 4 | 11 | -7 | 2 |

**1. deild menn**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 11 | 6 | - | 3 | - | 2 | 24 | 14 | 10 | 21 |
| 2 B68 | 11 | 6 | - | 2 | - | 3 | 26 | 15 | 11 | 20 |
| 3 B71 | 11 | 6 | - | 2 | - | 3 | 24 | 14 | 10 | 20 |
| 4 TB | 11 | 5 | - | 4 | - | 2 | 18 | 16 | 2 | 19 |
| 5 FC Hoyvík | 11 | 6 | - | 1 | - | 4 | 15 | 16 | -1 | 19 |
| 6 VB/Sumba | 11 | 5 | - | 3 | - | 3 | 23 | 19 | 4 | 18 |
| 7 NSÍ | 11 | 4 | - | 2 | - | 5 | 19 | 23 | -4 | 14 |
| 8 Víkingur | 11 | 2 | - | 5 | - | 4 | 9 | 10 | -1 | 11 |
| 9 Skála | 11 | 2 | - | 2 | - | 7 | 10 | 19 | -9 | 8 |
| 10 MB | 11 | 0 | - | 2 | - | 9 | 11 | 33 | -22 | 2 |

**1. deild kvinnur**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 9 | 7 | - | 2 | - | 0 | 21 | 4 | 17 | 23 |
| 2 KÍ | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 40 | 4 | 36 | 19 |
| 3 Víkingur | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 16 | 14 | 2 | 14 |
| 4 Skála | 9 | 3 | - | 1 | - | 5 | 14 | 23 | -9 | 10 |
| 5 B68/NSÍ | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 3 | 23 | -20 | 4 |
| 6 EB/Streymur | 9 | 1 | - | 1 | - | 7 | 5 | 31 | -26 | 4 |